# Flokkarnir um fólkaskúlan

ÚTBÚGVING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Heimasíðan hjá Skúlablaðnum hevur verið væl vitjað og endurgivin seinastu dagarnar. Orsøkin er tann, at blaðið hevur lovað politisku flokkunum framat at siga sína áskoðan um fólkaskúlan. Við loyvi frá blaðnum prenta vit her svarini frá flokkunum. Av tí at tilfarið er somikið rúgvismikið, verða nakrir av flokkunum eisini prentaðir í morgin.

Sambært skúlablaðnum, hevur blaðið sett flokkunum nakrar spurningar á økjum, sum tey halda vera sera týdningarmikil hjá næstu samgongu at fáa loyst. Tilfarið er skipað soleiðis, at flokkarnir svara stutt og greitt. Skúlablaðið sigur, at stevnuskráirnar nevna nógv av hesum viðurskiftum, men eru ofta orðaðar soleiðis, at tær eru lítið ítøkiligar.

- Vit skulu heilt ítøkiliga vita, hvat hesir flokkarnir standa fyri og hava sett sær fyri at fremja, koma teir í samgongu, sigur Skúlablaðið, sum er at finna á skulabladid.fo.






**Í gjár prentaðu vit Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Í dag kemur so restin av tilfarinum: Sjálvstýrisflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin**

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

## Lærarar og næmingar vinnarar í einum framtíðar føroyskum fólkaskúla

### Útbúgvingin hjá lærarum

*Ætlanin er at læraraútbúgvingin verður umskipað til eina bachelor útbúgving. Ynskið hjá Føroya Lærarafelag er, at ein 5 ára kandidatútbúgving verður viðtikin beinanvegin og fer í gongd í 2009 – við samsvarandi lønarlagi sum aðrar kandidatútbúgvingar. Hvør er tykkara støða til hetta?*

Sjálvstýrisflokkurin heldur, at læraraútbúgvingin skal vera so góð sum gjørligt. Vísandi til londini, sum vit fegin vilja samanbera okkum við, so hava tey ásannað, at tað arbeiðið, sum lærarin ger, er ein av berandi súlunum í samfelagnum. Børnini eru størsta, besta og virðismesta tilfeingið, sum landið eigur. Tí er arbeiðið at vera lærari, eitt sera krevjandi starv og hesin má verða so væl skúlaður til uppgávuna, at ongin ivi er um førleikan fakliga og námsfrøðiliga.

Metir serfrøðin, at 5 ára kandidatútbúgving er besta loysnin, vil Sjálvstýrisflokkurin virka fyri at fáa framt hesa loysn. Tað er greitt, at longda útbúgvingin setur fíggjarlig krøv til tað almenna og lønin má eisini verða samsvarandi útbúgvingini og ábyrgdini

### Býtið millum land og kommunu

*Føroya Lærarafelag saknar eina greiða útmelding um, hvat politisku flokkarnir vilja, tá ið tað snýr seg um býtið millum land og kommunu á skúlaøkinum. Ganga tit inn fyri 6-7 tvingaðum kommunalum økjum, og at hesi økini umsita fólkaskúlan fult og heilt?*

Gongdin í grannalondunum og herheima vísir greitt, at framtíðar bygnaðurin verður størri kommunalar eindir. Sjálvstýrisflokkurin ásannar, at skulu størri uppgávur leggjast út til kommunurnar at umsita er neyðugt, at nóg stórt fólkagrundarlag er í økinum, til tess at hava eina væl virkandi kommunala umsiting. Tað má og skal verða ein gularót fyri kommunurnar, at tær sjálvbodnar leggja saman í størri eindir. Sjálvstýrisflokkurin hevur ikki ásett nakað endaligt tal av kommunum, men álitið vísir til, at sjey ella nýggju kommunueindir eru hóskandi. Eydnast ikki kommununum sjálvbodnar at finna fram til eina endaliga loysn, má hetta í gerast við lóggávu.

*Um so er, hvørja tíðaráseting seta tit á, at hetta skal verða framt?*

Kommunusamanleggingarnar eiga at verða avgreiddar í komandi valskeiði.

Tað ógreiða ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á skúlaøkinum gagnar ikki skúlanum. Sjálvstýrisflokkurin heldur tí, at tað er skilabest, um kommunurnar fáa ábyrgdina av øllum fólkaskúlaøkinum. Tað áliggur landsmyndugleikanum tó at tryggja, umstøðurnar, undirvísingartilboðini og karmarnir eru á einum nøktandi javnbjóðis støði kring landið, so vit ikki innan skúlaskap fáa A og B støðu, alt eftir sum kommunurnar raðfesta skúlaøki.

Kommunurnar eiga ikki at yvirtaka skúlan, fyrr enn ein greið avtala er gjørd millum landsmyndugleikarnar og kommunurnar um yvirtøkuna. Avtalan má m. a. staðfesta, hvussu lærararnir verða uppstigaðir – eftirútbúgving, skeið og førleikamenning, hvussu skúlarnir kunnu skipast, hvussu hóskandi undirvísingartilfar fæst, og hvussu kommunurnar kunnu fáa fíggjarligar møguleikar at byggja ella umbyggja skúlar.

Føroya Lærarafelag og felagið hjá skúlastýrislimum eiga at verða hoyrd um avtaluna.

Áðrenn kommunurnar kunnu yvirtaka fólkaskúlan, mugu lógar- og kunngerðarbroytingar gerast, tí kann hetta vera tíðarkrevjandi; men um allir partar eru samdir og samstarva væl, so skuldi borið til, at kommunurnar yvirtaka skúlan í 2010.

### Stórir og smáir skúlar

*Í Føroyum eru 57 fólkaskúlar, nógvir teirra eru smáir. Hvør er tykkara støða til skúlastøddir út frá einum skúlafakligum sjónarhorni?*

Um kommunurnar skulu taka yvir skúlaøkið, so mugu tær eisini sjálvar sleppa at skipa skúlaviðurskiftini; eisini tá talan er um, hvussu nógvir og hvussu stórir skúlarnir skulu vera.

Um ein skúlasamanlegging krevur um-, uppí- ella nýbygging, so má kommunan – ella kommunurnar, tí tær eiga at kunna samstarva um skúlaøkið – hava møguleikar at fíggja nýggju umstøðurnar. Sum støðan er í løtuni, so kunnu kommunurnar ikki átaka sær eina lánibyrðu, sum er hægri enn ein álíkning, tí hava fægstu kommunur møguleika at fara undir skúlabygging ella størri umbygging.

Skúlasamanleggingar eiga ikki at vera grundgivnar við sparingum; grundgevingin eigur at vera, at skúlin gerst betri. Ein skúlasamanlegging kann hava við sær, at tímatørvurin er øðrvísi, enn á skúlunum, sum vórðu lagdir saman. Tað kundi verið skilagott at havt fleiri lærarar til yngru flokkarnar. Eitt annað hugskot kundi verið at nýtt námsfrøðingar saman við lærarum.

Tá skúlar leggja saman, eiga tímarnir, sum vóru á skúlanum, at fella aftur til Mentamálaráðið, sum so kann deila teir út aftur. Soleiðis hvørva teir ikki úr skúlaverkinum, men verða latnir aftur í stóru puljuna av tímum, sum Mentamálaráðið hevur at ráða yvir og fordeila. Hetta er ikki at spara, men ein effektivisering av tímunum.

### Næmingar við serligum tørvi

*Fólkaskúlalógin ásetir, at fólkaskúlin er fyri øll – sama hvønn tørv næmingurin hevur. Veruleikin er, at í fólkaskúlanum eru nógvir næmingar við serligum tørvi, sum ikki fáa nøktandi undirvísing. Hvussu skipa vit fyri, at tey veiku í okkara skúla, atferðartruplir næmingar og onnur við serligum tørvi fáa eitt nøktandi skúlatilboð?*

Fólkaskúlin er fyri øll. Støði má takast í tí einstaka næminginum. Næmingar, sum hava ein serligan tørv, skulu hava nøktandi skúlatilboð, sum mennir teirra fakliga støði og teirra førleikar. Skúlin skal kunna bjóða eyka tímar ella stuðlar, har tað verður mett neyðugt. Vit halda ikki, at næmingar eiga at vera býttir upp eftir førleika, atferð ella evnum. Næmingar eiga at ganga í flokki saman við sínum javnaldrum; stórur dentur eigur at verða lagdur á, at næmingar ikki detta burtur ímillum fakliga ella mistrívast sosialt. Støðan hjá einstøkum næmingi kann tó vera so serlig, at hann ikki ella bert lutvíst fær nøktað sín lærutørv í fólkaskúlanum. Hesir næmingar eiga at fáa ískoytistilboð.

*Um ja, hvussu tryggja vit so, at allir næmingar fáa eitt nøktandi tilboð?*

Allir skúlar eiga at verða eftirmettir regluliga, so at ongin ivi er um støðið í skúlanum.